# Journalistarnir hava

**– Vaksandi talið av samskiftisfólkum hevur við sær, at journalistarnir á redaktiónunum fáa meira javnbjóðis mótspæl á fjølmiðlaleikpallinum. Tíðin er farin frá, at ein journalistur ótarnaður sleppur at seta dagsskránna eftir egnum høvdi, meðan fyritøkur og stovnar bebbaræddir goyma seg handan setningin "onga viðmerking" ella lata seg brúka í einum spæli, sum teir ikki kenna avleiðingarnar av.Tað heldur Rúnar Reistrup, kunningarfrøðingur. Lesið sætta part av greinarøð um politikk og fjølmiðlar.**

## Samrøða



**Páll Holm Johannesen**
pallurin@hotmail.com

– Eg freistist til at siga, at tey bæði stóru bløðini eru farin frá at vera málgøgn hjá einum einstakum flokki, til nú at vera málgagn hjá øllum flokkum. Allir sleppa framat við sínum, og kritiska viðgerðin verður forsømd. Samstundis tykist tað, sum nógvar fyritøkur og stovnar halda, at tá tú hevur sett eitt samskiftisfólk, so skal viðkomandi senda minst tvey tíðindaskriv til fjølmiðlarnar um mánaðin, og hesi koma so at siga óskerd út til lesararnar.

Tað heldur kunningarfrøðingurin, Rúnar Reistrup. Á síni skrivstovu í Keypmannahavn nýtir hann sum samskiftisleiðari á donsku teldufyritøkuni ZYB stóran part av síni arbeiðsorku til snikka boðskapir frá fyritøkuni soleiðis til, at teir tekkjast fjølmiðlunum.

### Góðar fjølmiðlaroyndir

Tú arbeiðir sum samskiftisleiðari á donsku fyritøkuni ZYB. Hvussu arbeiðir tú heilt ítøkiliga og praktiskt, tá ein positiv søga um fyritøkuna skal út til miðlarnar?

Mítt dagliga samskiftið við fjølmiðlarnar hevur sjáldan bert til endamáls at fáa eina einstaka positiva søgu út, men hetta kann ofta vera ein partur av einari størri strategiskari ætlan. Tá taki eg altíð útgangsstøði í endamálinum við umtaluni og skeri boðskapin til eftir tí. Tá neyðuga innanhýsis forarbeiði er gjørt, er næsta stig at avseta søguna á rættan hátt og, í nógvum førum, til tann rætta journalistin, og her kemst ikki uttanum, at royndir innan miðlaheimin koma einum samskifitsfólki til góðar. Væleydnað samskifti krevur, at tú kennir móttakaran og dugir at seta teg í hansara stað, og tá ein søga ella eitt ávíst sjónarmið skal út, má hetta fyrst fanga áhugan hjá journalistinum, áðrenn tað í hinum endanum verður borðreitt fyri endaligu móttakarunum. Sæð úr stólinum hjá einum samskiftisleiðara snýr tað seg tí um at snikka boðskapin soleiðis til, at hann kemur ígjøgnum journalistiska spælið á ein slíkan hátt, at endaliga umrøðan tænir tí endamáli, sum fyritøkan hevði við henni. Hetta kanna gerast á ymiskan hátt, og her er stórur munur á arbeiðsháttinum hjá samskiftisfólki. Tann, sum hevur roynt at arbeitt innan miðlaheimin, veit oftast rættiliga væl, hvussu ein slíkur bóltur skal spælast, meðan teir samskiftisráðgevar, sum bert hava eina akademiska bakgrund, men ikki royndir "frá gøtuni", ofta snáva. Hinvegin eru fyrrverandi journalistar uttan eina akademiska tilgongd til samskiftisráðgeving sjáldan væl fyri á strategiska støðinum - teir eru yvirhøvur dugnaligir taktiskt, men strategiskt vantar journalistum ofta neyðugu tyngdina fyri at klára seg á leiðslustøði í einari fyritøku.

### Spunasmiðir eru lobbyistar

Bankar, aðalráð og fakfeløg hava sett samskiftisfólk í starv.



Væntar tú, at hetta rák vindur upp á seg, ogat politiskir flokkar eisini fara at seta samskiftisfólk/spunasmiðir í fast starv?

Rákið hevur longu vundið nógv uppá seg, og tað fer at halda fram. Í mun til vinnulívið og tað almenna hava flestu politisku flokkarnir verið eitt sindur seinir á veg við at seta samskiftisfólk í starv. Eg vænti, at hetta kemst fyrst og fremst av, at flokkarnir eru rættiliga lítið mentir fíggjarliga. Men nú Javnaðarflokkurin hevur fingið pengar millum hendurnar, er sannlíkt, at hinir flokkarnir so ella so fara at syrgja fyri at gerast betur fyri fíggjarliga, og tá fara samskiftisráðgevar, ella politiskir spunasmiðir, uttan iva at standa ovast á innkeypslistanum.

Hvussu fer tað at ávirka føroysku miðlarnar, at vinnulív, flokkar og tað almenna fara at styrkja seg við spunasmiðjum?

Tað fer at gerast lættari at reka ein ókritiskan fjølmiðil og torførari at reka ein kritiskan fjølmiðil. Miðlarnir fáa alsamt meira tilfar borðreitt á silvurfati frá fyritøkum, flokkum og øðrum áhugabólkum, og um teir einki hava ímóti at eta tað rátt, er tað lætt og ómakaleyst at fylla eitt blað ella eina sendiflatu við væl skornum, men ókritiskum, tilfari. Hinvegin verður trýstið frá fyritøkum og áhugabólkum á kritisku fjølmiðlarnar størri, um spunasmiðir gerast meira vanligir. Spunasmiðir eru ikki bara samskiftisfólk, men lobbyistar, sum eisini hava til uppgávu at trýsta fjølmiðlar til at makka rætt. Og tað trýstið gerst beinanvegin fíggjarligt, um spunasmiðurin umboðar eina stóra fyritøku við einum stórum tørvi á marknaðarføring. Hendan gongdin hómast longu nú, og tað er týðuligt, at ávísar fyritøkur hava eina klemmu um journalistiska nalvastreingin hjá summum føroyskum miðlum. Men tær flestu fyritøkurnar halda seg frá hesum slag av lobbyismu, og tann vanligi samskiftisráðgevin á fyritøkum og almennum stovnum er hvørki lobbyistur ella spunasmiður, men arbeiðir rættiliga snævurt innan samskifti.

Fyri einstøku journalistarnar á fjølmiðlaredaktiónunum merkir vaksandi talið av samskiftisfólkum hinvegin, at teir fáa meira javnbjóðis mótspæl á fjølmiðlaleikpallinum. Tíðin, tá ein journalistur ótarnaður slapp at seta dagsskránna eftir egnum høvdi, meðan fyritøkur og stovnar bebbaræddir krógvaðu seg aftan fyri setningin "onga viðmerking", ella lótu seg brúka í einum spæli, sum teir ikki kendu avleiðingarnar av, er í stóran mun farin. Teir stóru fjølmiðlarnir og einstakir

Sosialurin